# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað munnu verða fá venjarastørv í landinum, sum eru so krevjandi sum venjarastarvið í KÍ*
*Eyðun Klakstein, KÍ-venjari*

# Stríðsviljin í fremstu røð

**Hjalgrím Elttør hevur prógvað, at hann vil stríðast fyri landsliðsplássinum, og á miðvøllinum er stríðsviljin hjá Paula G. Hansen meira verdur enn bóltførleikin hjá Tem Hansen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Týsdagin hevði Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, tíðindafund í FSF-húsinum. Á skránni var úttøku av A-landsliðshópinum til dystirnar móti Italia og Skotlandi.

Hópurin telur 20 spælarar, umframt Fróða Benjaminsen, sum er leikbannaður til dystin móti Italia. Tað verður tó roknað fyri givið, at Fróði er við aftur, tá Skotland stendur fyri framman, og tí rúmar úttøkan 21 mans.

Júst leikluturin hjá Fróða var eisini nakað, sum Jógvan Martin Olsen legði stóran dent á.

- Tað er kanska tann størsta rokadan, sum eg havi gjørt, tá eg flutti Fróða aftur í verjuna. Men hann hevur gjørt eitt framúr arbeiði. Ikki bara sum spælari, men eisini sum leiðari á og uttan fyri vøllin. Tí er tað ein stórur smeitur, at hann ikki er tøkur móti Italia, men tað hjálpir tó væl, at Jón Rói veruliga tykist vera komin seg eftir sín skaða.



*Við góðum avrikum fyri NSÍ hetta kappingarárið hevur Hjalgrím Elttør aftur vunnið seg inn í landsliðshitan*

**Stríðsmenn á miðvøllin**

Tað er annars á miðvøllinum, at størstu broytingar eru at síggja. Nýggj andlit eru her Pauli G. Hansen, Bergur Midjord og Hjalgrím Elttør, og landsliðsvenjarin tóktist avkláraður um hesar úttøkurnar.

- Pauli var vigaður í mun til Tem Hansen. Her mettu vit, at dygdirnar hjá Paula eru týdningarmiklari móti so sterkari mótstøðu, sum Italia er. Bergur hevur verið at kalla støðugt skaddur, síðani venjingarleguna í fjør, og hjá okkum er tað bara gleðiligt, at hann nú aftur er við. Og Hjalgrím hevur veruliga prógvað, at hann skal roknast við. Vit mettu ikki, at hann spældi væl í fjør, og hóast hann skifti til NSÍ, so fekk hann greitt at vita, at hann fyrst skuldi prógva, hví hann skuldi koma aftur í hópin. Og tað hevur hann gjørt fyrstu 10 umførini í Formula-deildini, sigur Jógvan Martin.

Og so fegnaðist venjarin annars um, at eitt U-21 landslið nú eisini er komið á vøllin. Ikki minst, tí hetta ger tað lættari at menna spælarar, og tí úttøkan sum so kanska verður lættari hjá A-landsliðnum.

- Tá vit ikki hava havt eitt U-21 landslið, so hevur tað verið ein skylda hjá A-landsliðsvenjaranum at hugsa longur fram. Og til dømis vildi ein málverji sum Gunnar Nielsen absolutt verið roknaður við, tá varamaðurin hjá Jákupi skuldi kjósast. Men tað er givið, at tað er nógv meira mennandi fyri spælaran, at spæla tveir heilar dystir á U-21, heldur enn at sita á beinkinum á A-landsliðnum, sigur Jógvan Martin Olsen.

## FAKTA

### A-landsliðið

**Málverjar**
Jákup Mikkelsen, B36
Meinhardt Joensen, KÍ

**Verjuspælarar**
Jón Rói Jacobsen, AaB
Fróði Benjaminsen, B36
Atli Danielsen, BK Frem
Marni Djurhuus, EB/S
Mortan úr Hørg, HB
Rasmus Nolsøe, HB
Óli Johannesen, TB

**Miðvøllur**
Súni Olsen, AaB
Bergur Midjord, B36
Mikkjal Thomassen, B36
Jákup á Borg, HB
Sámal Joensen, GÍ
Símun Samuelsen, Keflavík
Hjalgrím Elttør, NSÍ
Pauli G. Hansen, Skála

**Álop**
Christian Høgni Jacobsen, HB
Andrew av Fløtum, Fremad Amager
Christian Holst Lamhauge, Lyngby
Rógvi Jacobsen, HB

———————————————

### U-21 landsliðið

**Málverjar**
Gunnar Nielsen, Frem
Símun Rógvi Hansen, B71

**Verjuspælarar**
Jónas T. Næs, Fremad Amager
Einar Hansen, NSÍ
Jóhan T. Davidsen, NSÍ
Poul Thomas Dam, HB
Fritleif í Lambanum, ÍF
Sigmund Jacobsen, KÍ

**Miðvøllur**
Levi Hanssen, Skála
Jóhan V. Gunarrsson, B36
Bogi Løkin, NSÍ
Emil N. Leifsson, HB
Magnus Olsen, B71
Pætur T. Jørgensen, HB

**Álop**
Páll M. Joensen, HB
Jón Krosslá, VB/Sumba
Kristoffur Jakobsen, KÍ
Tummas Hans Rubeksen, AB

# Byrja í Kroatia

**Talan verðum um knallharðan dyst, tá føroyska U-21 landsliðið fyri fyrstu ferð skal royna seg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Vit kunnu rokna við at standa á einum veldugum leikvølli í Zagreb við einum 30-35 hitastigum. Og har mótstøðum telist millum bestu U-landslið í Europa. So tað er greitt, at talan er um stóra uppgáva.

Soleiðis tók Bill McLeoud Jacobsen til, tá hann týsdagin kundi kunngera fyrsta U-21 hópin í føroyskari fótbóltssøgu.

Saman við Heðini Askham skal Bill taka sær av liðnum, og hóast mótstøðan er stór, so ivast teir ikki í, at hetta verður mennandi fyri spælararnar.

- Fyrstu dystirnir eru Kroatia og Albania á útivølli. Kroatar eru millum bestu U-21 liðini í Europa, meðan Albania ikki er heilt so sterkt. Hartil hava vit Italia, sum hevur verið í fimm av seinastu sjey EM-finalunum, Grikkalands, sum er rættiliga sterkt og so Azerbadjan, sum vit ikki kenna tað heilt stóra til.

- Ítróttarliga málið er fyrst og fremst at menna komandi A-landsliðsspælarar. Tí kanst tú siga, at úrslitini ikki koma í fremstu røð, men eingin skal ivast í, at vit fara eftir øllum tí, sum vit kunnu fáa. Tað er eisini ein veldugur styrkur í so máta, at flestu spælararnir hava royndt seg á yngri landsliðum. Tað ger teir munandi betri førar fyri at standa seg móti avbjóðingunum. Og við U-21 fáa teir enn betri møguleika at menna seg til komandi A-landsliðsspælarar.

Spælararnir á U-21 liðnum eru føddir í 1986, '87 og '88.